# í Klaksvík






*Hendan dukkan frá loyndin.com fleyg nógv runt í Atlantis sum ein annar baðibóltur*



*Tá Hallur Joensen, kontrikongur, Magnus Arge, ursmiður, og Karl Martin Samuelsen, popidol, taka seg saman at syngja »Side by Side«, tá kvinnur eru lidnar at sjaina teir*

at hava við sær?, spyr verturin kontrikongin.

– Tað plagar at vera konan, sum blakar mær klæðir, men nú fari eg sjálvur at sleppa at keypa klæðir, roknar Hallur Joensen við.

> *Ved I, at mænd også har et g-punkt?*
> *Katrine Berling Christensen*

Hinir báðir nikka – hatta við at fáa tveitt pløgg í høvdið kenna teir alt til, og verturin greiðir frá, at um ein tíma fara vit at síggja, hvussu lekkrir menninir kunnu blíva.

– Gleða tit tykkum at síggja teir aftur?, rópar verturin, og menn játta hart við ein munn.

– Jaaa..., brummar tað íðið úr salinum.

Tónleikurin fer aftur í gongd, og ungu damurnar í evarska lítlu jólagávunum koma innaftur á pallin – og tað gera dreingirnir forrestin eisini.

## Plastikk

Helena Sundskarð frá Artharmonia, sum er stovan, sum ger plastikskurðviðgerðir í Føroyum, kemur á pallin.

– Tað eru mest kvinnur, sum verða settar í samband við slíkar viðgerðir, men menn í øllum aldri koma eisini. Mest vanligu viðgerðirnar eru eyguni, nøsin og oyruni, men vit fáa eisini menn til feittsúgving, greiðir hon frá, sum um tað er natúrligasta viðgerðin í verðini.

Menninir í salinum grína, áðrenn Gunnar Nolsøe spakuliga tekur orðið.

– Nú kann eg ikki lata vera við at spyrja... Um tað nú skuldi verið soleiðis, at mann følir seg í so lítið vaksnan á einum serligum stað. Er so nakað, tit fáa gjørt?

– Meinar tú við nøsina, spyr kvinnan.

Verturin rodnar eitt sindur og roynir víðari.

– A kind of, sigur Gunnar hálvsmæðin á enskum.

– Nei. Tað gera vit ikki, men tað kundi verið, at onkur skal hava sín rættaðan út ella okkurt tílíkt, svarar umboðið fyri plastikkkirurgarnar.

Genturnar í tødnaðu jólagávuhugskotunum til tað innasta koma aftur á pallin, og so er steðgur.

## Pinnamatur

Úti í gongini stendur eitt sindur av sterkum løgi og øli og menn eru ikki seinir at fáa sær upp í nevið. Eisini pinnamatarnir hvørva skjótt.

– Endiliga fáa vit okkurt sovorið at fara til!

– Tað var ikki nógv uppi á hasum damunum!

– Tær vóru fínar. Har vóru bara for nógvir dreingir!

Meiningarnar úti í gongini eru ymiskar, men eitt eru teir samdir um.

– Hetta hevði ikki verið, tá vit vóru 18, flenna nógvir.

## Makeover

Inni í hálvmyrkrinum skulu dreymamenninir avdúkast, nú vit sleppa at síggja, hvat úrslit frisørdaman og handilskonan eru komnar til við teimum fýra sjainaðu monnunum.

Teir koma út. Onkur sær út sum ein nýggjur maður.

> *Endiliga fáa vit okkurt sovorið at fara til*
> *Maður*

Hallur Joensen er latin í eina stramma grøna troyggju, einar myrkar buksur, ein vest, einar hvítar ítróttarskógvar og so er hann kliptur, so hárið peikar upp í loft.

– Elendigt!, rópar ein á aftastu rekkju.

Men restin av monnunum klappa óført, nú fýra kendir klaksvíkingar eru latnir í nýggjan ham.

## Romantikkur við lukti

Makeover-menninir fara av pallinum aftur, og inn koma Archibald Black, sum nokk ikki nýtist aðra frágreiðing, og Durita Joensen, klaksvíkskvinna, sum hevur búð í Keypmannahavn í nøkur ár og arbeiðir í handli, sum selur leikur til vaksin.

Tey tosa um romantikk.

Archibald er bragdligur.

– Eg minnist fyri langari tíð síðan, at ein maður í familjuni segði við meg: »Tit eru ikki eitt par, fyrr enn tit hava fratað saman«. Seinni fann eg útav, hvat hann meinti við. Tað er ein avbjóðing at halda lív í forholdinum, og mann má gera ein innsats, heldur hann.

– Og so dámar mær eisini